# Stuðul til uppihaldspening

Umsókn um stuðul til uppihaldspening fyri seinna hálvár 2005 saman við kvittanum fyri goldnan barnapening, skal vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 2. desember 2005. Um goldið er til Toll- og Skattstovu Føroya, er ikki neyðugt at lata inn kvittanir.

Umsóknir sum eru Almannastovuni í hendi innan nenvdu freist verða væntandi avgreiddar í desember 2005.

Umsóknarbløð fáast við at venda sær til økisdeildirnar. Verður søkt fyrstu ferð, skal avrit av gjaldsavgerð um barnagjald/-gjøld frá Ríkisumboðnum, ella samsvarandi útlendsk gjaldsavgerð sendast inn saman við umsóknini.

**Almannastovuni**

Økisdeildin í Tórshavn
J. Broncksgøta 25
100 Tórshavn
Tlf. 353570 • Fax 353571

Økisdeildin í Eysturoy
Heiðavegur
620 Runavík
Tlf. 474710 • Fax 474711

Økisdeildin í Norðoyggjum
Klaksvíksvegur 78A
700 Klaksvík
Tlf. 457240 • Fax 457241

Økisdeildin í Suðuroy
800 Suðuroy
Tlf. 353560 • Fax 353561

# Søkt verður eftir skrivara

Søkt verður eftir parttíðarskrivara til ELNEVNDINA at byrja tann 1. januar 2006.

Starvið umfatar at taka sær av dagliga virkseminum hjá nevndini, harundir málsviðgerð, at fyrireika fundir og annað arbeiði, sum er fevnt av arbeiðsøki hjá ELNEVNDINI.

Skrivarin útinnir arbeiði í felag við formannin.

Skrivarin skal hava eltøkniligan førleika.

Løn samb. avtalu.

Umsóknir saman við prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til ELNEVNDINA, Reynagøta 24, Postboks 252, 110 Tórshavn og umsóknirnar skulu vera latnar inn í seinasta lagi tann 12. desember 2005.

Gjøllari upplýsingar fáast frá Bjartur Dalsgarð, formanni á tlf. 354000.

**ELNEVNDIN**

ELNEVNDIN er stovnur undir Vinnumálaráðnum, sum er sett sbrt. løgtingslóg um sterkstreymsútbúnað. Arbeiðsøkið hjá nevndini eru tey verkevni, sum standast av løgtingslóg um sterkstreymsútbúnað og løgtingslóg um løggilding av elinnleggjarum við tilhoyrandi kunngerðum, harundir at hava eftirlit við rakstri av sterkstreymsútbúnaðinum og við eltilfari hjá innflytarum, heilsølumonnum og sølubúðum v.m.

# Umlættingarheimið Dáin í Klaksvík

Søkir eftir 1 pedagogi í barsilsstarv frá 1. januar 2006 til 15. juli 2006, at arbeiða 20 tímar um vikuna í Dagumlættingini.

Dagumlættingin er opin gerandisdagar frá kl. 10 til kl. 17.

Endamálið við arbeiðinum er m.a. at skapa tryggar karmar hjá brúkaranum og at sera ígongd og skipa fyri virksemi, sum hevur áhuga fyri teir einstøku brúkararnar. Umráðandi er, at tann sum verður settur kann arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevni.

Løn og setanarviðurskiftir sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran, tlf. 457185, millum kl. 10 og 12, gerandisdagar.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera Dáanum í hendi í seinasta lagi 12. desember 2005.

Um ongin skikkaður umsøkjari er, verður hjálparfólk sett í starvið.

**Umlættingarheimið Dáin**
Mýrivegur 11
700 Klaksvík



# Myndir til jólagávu?

- so ræður um at skunda sær!

Hevur tú onkuntíð verið her og fingið tikið eina portrettmynd, sum tú nú ætlar at geva í jólagávu? So hjálpi eg tær fegin við tí - eg átaki mær at gera kopi í ymsum støddum.

Men myndirnar mugu vera mær í hendi **í seinasta lagi** 10. desember 2005.

Per á Hædd
Fotoatelier tlf. 31 71 11

# Heilsuskúli Føroya 800 Tvøroyri

Søkir eftir lærara, til fulla tíð, ella eftir nærri avtalu, at byrjar 1. januar 2006.

Starvið umfatar undirvísing á heilsuútbúgvingunum, fyrireiking av nýggjum útbúgvingum og tilrættisleggjan í samband við undirvísing.

Tú skalt hava eina útbúgving sum sjúkrarøktarfrøðingur, fyrimunur er, um tú hevur námsfrøðiliga eftirútbúgving ella aðra eftirútbúgving, skeið v.m.

Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi og mennandi starv, har tú kemur at arbeiða sjálvstøðugt í tínari undirvísing. Undirvísingin er løgt til rættis sum toymisarbeiði og sum verkætlanir, í tøttum tvørfakligum samstarvið ímillum lærarарnar á skúlanum.

Undirvísingin tekur støði í lærugreinum sum eru viðkomandi fyri heilsu- og sjúkrarøkt. Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til leiðaran á skúlanum á tlf. 372855.

Umsóknarfreistin er 28. november 2005 og umsóknir skulu sendast til:

**Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya**
att: Súsanna Mortensen, vararektara,
Eirargarður 14 B,
FO-100 Tórshavn

# Til leigu/sølu

Í nýggja handils- og skrivstovubygningi okkara eru hølir til leigu/sølu.

Talan er um eitt høli á 1. hædd tilsamans uml. 100 m²

Hølini sum eru klár til innflytan eru vælegnað til skrivstovu ella annað lættari virksemið og hava atgongd frá Gulasteinsvegi og Heiðavegi.

Í kjallarahæddini er talan um eitt høli uml. 215 m² við atgongd frá Gulasteinsvegi. Hølini sum eru vælegnað til goymslu ella annað virksemið, verða klár til innflytan 1. januar 2006.

Ì bygninginum eru frammanundan Formula Føroyar, Grannskoðarastovan og Kiosk Vár.

Um hóskandi boð fæst kann eisini verða talan um sølu.

**Spf. Vársól, Heiðavegur 31**
**600 Saltangará**
**Tlf. 748392**
**varsol.s@kallnet.fo**

# Tofta kvøldskúli

**Veturin 2005/2006**

**Føroyskt fyri útlendingar** byrjar týsdagin 29. november 2005 kl. 19.00.

Upplýsingar fáast frá kvøldskúlaleiðaranum tlf. 447332.

Lesið Sosialin - so eru tit við